Kunngerðablaðið A
2013 Givið út 21. mai 2013

Nr. 50 17. mai 2013

**Løgtingslóg**
**um**
**serstakar treytir fyri fiskiskap eftir norðhavssild og makreli í 2013**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

*Virkisøki*

**§ 1.** Henda løgtingslóg fevnir um serstakar treytir fyri fiskiskapin eftir norðhavssild og makreli (*Scomber scombrus*) við fiskiførum undir føroyskum flaggi.

*Veiðigjald*

**§ 2.** Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi skal rinda eitt veiðigjald, sum verður lagt á hvørt fiskað kilo í rundari vekt av norðhavssild og makreli, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til annaðhvørt norðhavssild ella makrel í 2013.

*Stk. 2.* Veiðigjaldið er ávikavist

1) kr. 0,35 fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av norðhavssild, og
2) kr. 0,75 fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av makreli.

*Stk. 3.* Veiðigjaldið fer í landskassan.

**§ 3.** Veiðigjaldið, sbrt. § 2, er ikki galdandi fyri eigarar av fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

*Avreiðingargjald*

**§ 4.** Afturat veiðigjaldinum, sbrt. § 2, skal eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi rinda eitt avreiðingargjald, sum er kr. 2 fyri hvørt kilo í rundari vekt av norðhavssild og makreli, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til annaðhvørt norðhavssild ella makrel í 2013, og sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar.

*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 skulu eigarar av fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, rinda eitt avreiðingargjald, sum er kr. 1 fyri hvørt kilo í rundari vekt av norðhavssild og makreli, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til annaðhvørt norðhavssild ella makrel í 2013, og sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar.

*Stk. 3.* Avreiðingargjaldið, sbrt. stk. 1 og 2, verður ikki lagt á veiðu, sum fiskifarið letur skipi undir fremmandum flaggi, sum flytur veiðuna til virkingar ella frystingar til virki á landi í Føroyum, ella til virkingar ella frystingar til móttøkuskip undir føroyskum flaggi.

*Stk. 4.* Avreiðingargjaldið fer í landskassan.

*Manning*

**§ 5.** Manningar á fiskiskipum undir føroyskum flaggi, sum fiska sild og makrel í 2013, og manningar á móttøkuskipum undir føroyskum flaggi skulu lønast sambært føroyskum hýrusáttmálum. Í minsta lagi tríggir fjórðingar av manningini skulu vera føroyingar. Útlendingar, sum hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, verða javnsettir við føroyingar.

*Umrokning til runda vekt*

**§ 6.** Í sambandi við avgjaldið, sbrt. §§ 2 og 4, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta nærri reglur um umrokning av veiðu til runda vekt.

*Innkrevjing*

**§ 7.** Veiðigjaldið, sbrt. § 2, og avreiðingargjaldið, sbrt. § 4, fella til gjaldingar so hvørt, veiðan er avreidd.

*Stk. 2.* Fiskiveiðieftirlitið ger upp veiðigjaldið og avreiðingargjaldið og sendir eigara av fiskifarinum rokning mánaðarliga.

*Stk. 3.* Gjaldsfreistin er 10 dagar eftir dagfesting á rokning.

*Stk. 4.* Rinda eigarar av fiskiførum ikki rættstundis, skal renta rindast við 1% fyri hvønn byrjaðan mánað. Veiðigjaldið og avreiðingargjaldið, umframt renta og møguligur innkrevjingarkostnaður av hesum, kunnu krevjast inn við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum.

*Stk. 5.* Veiðigjaldið og avreiðingargjaldið umframt renta og møguligur innkrevjingarkostnaður, sambært løgtingslóg nr. 73 frá 7. juni 2012 um gjøld í sambandi við fiskiskap eftir makreli í 2012 og 2013, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2012, kunnu somuleiðis krevjast inn við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum.

*Annað*

**§ 8.** Hóast ásetingarnar í § 9 a, stk. 1-15 og stk. 17, og § 9 b, stk. 1-2 og stk. 5 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, kann landsstýrismaðurin við kunngerð loyva fiskiskapi eftir ávikavist norðhavssild og makreli í 2013 í friðaðu økjunum, sambært § 9 a, stk. 1-15 og § 9 b, stk. 1-2 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, undir nærri ásettum treytum.

**§ 9.** Í tann mun henda lóg ikki hevur serligar ásetingar, so er løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap við tilhoyrandi kunngerðum galdandi.

*Revsing*

**§ 10.** Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi verður revsaður við bót, um hann brýtur ásetingarnar í § 5.

*Stk. 2.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

*Gildiskoma*

**§ 11.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá framløgudegnum.

*Stk. 2.* Samstundis, sum henda løgtingslóg kemur í gildi, fer úr gildi løgtingslóg nr. 73 frá 7. juni 2012 um gjøld í sambandi við fiskiskap eftir makreli í 2012 og 2013, sum broytt við løgtingslóg nr. 148 frá 20. desember 2012.

Tórshavn, 17. mai 2013

**Annika Olsen (sign.)**
varaløgmaður

Lm. nr. 150/2012